# Farvæl fonn

*VEÐURFRØI. Undantaksstøða hevur verið galdandi í Føroyum seinastu dagarnar. Vermandi vársólin vann á mjørka og kulda fleiri morgnar á rað, og føroyski spontaniteturin kom væl við, tá ið fólk nutu sjáldsama góðu dagarnar*



*Bardagi millum vetur og vár úti á Høgareyni millum Vestmanna og Kvívík tórsdagin. Í vegjaðaranum liggur fonnin frá seinasta stórkavanum í andarleypi. Nú tygum lesa hetta, er fonnin óivað minkað munandi, ja kanska horvin heilt. Tí sólin helt fram at bræða, vikuna út.*
**Mynd: Jens Kristian Vang**

HØGNI MOHR

Kavafonnin grætur.

Seinasta vika og vikuskiftið gjørdist endaliga uppgerð lýkkunnar við treiskar og haldførar fannir.

Sum heild er ikki óvanligt, at mei er góður. Men sjáldsamt er, at góðveður er so mangar dagar í einum. Heilt hampuligt veður hevur verið í Føroyum einar tvær til tríggjar vikur, men leygardagin kom vakra várveðrið á hæddina við hita omanfyri 16 stig í skugganum.

**Spæl og matgerð**
Úr øllum heraðshornum fræттist, at mongu hitastigini elvdu til, at kærkomin undantaksstøða hevur verið sett í gildi í annars væl skipaðum gerandisdøgum og vikuskiftum. Sumtstaðni hava mølir og strendur verið tiltaklaðar av fólki. Og í áum og løkum spældu ørgrynna av bæði børnum og vaksnum. Flestu grillirnar vórðu drignar út í tún, og handilsfólk hava selt rúgvur av koli til hesa óvanligu matgerð undir opnum hválvi.

**Stongt vegna veður**
Óvitar hava eisini ligið í báti á firðum og vøtnum. Og nógv fólk hava verið langar gongutúrar í haga og millum bygda. Skúlar og sunnudagsskúlar hava slept vanligum fyriskipanum og ístaðin latið sól og ætt avgjørt, hvaðar leiðin skuldi ganga; einasta treyt hevur verið, at farið varð burtur úr kvalnum skúlastovum og salum.

**Veðurprát**
Hóast næturnar hesa ársins tíð kunnu vera kaldar; fyrsti summardagur er ikki fyrr enn 25 mai; so hava grannar hugnað sær í urtagørðunum við mati og víni til langt eftir miðnátt um vikuskiftið.

Høvuðsevnið, ið tosað varð um við borðini, sigst at hava verið...veðrið!



*Vatnkríggj í Vestmanna. Ítróttarlærarinnurnar báðar, Gyðja og Annika, sleptu 7. flokki út í Gjógvará í góðveðrinum tórsdagin. Hetta var seinasti ítróttartími, áðrenn flokkurin fer á setursskúla í Hetlandi 22. mei. Ovfarakátu næmingarnir vóru sum brótarаross, men tað var í berari frøi. Ein av næmingunum, Emma nevnd, noyddist at taka eina heila skotríð av smørtum fremmandaorðum í nýtslu til tess at lýsa støðuna: »Hetta er ultra, mega, mega, ultra, deiligt...«*
**Mynd: Jens Kristian Vang**



*Hendan myndin talar fyri seg. Viðmerkjast skal, at hon er tikin í Føroyum leygardagin, tá ið myndamaður okkara var á Leynasandi og hugdi seg um.*
**Mynd: Jens Kristian Vang**



# Skifta vita í Dímun

*Dímunarvitin skal skifta frá gassi til sólorku. Gamli vitin verður tikin niður í summar, og ein nýggjur settur upp*

EDVARD JOENSEN

Vitin í Stóru Dímun syngur nú seinastu regluna. Hann verður tikin niður beint eftir 1. juni, og ein nýggjur verður settur uppaftur.

Í tíðarskeiðnum frá 1. juni til hálvan juli er vitin sløktur, tí so mikið ljóst er, at ikki verður hildið neyðugt at lata hann lýsa.

Avgjørt er, at skiftast skal frá at brenna gass til sólorku, og gamli vitin skal tí skiftast út við ein meira tíðarhóskandi.

Óla Jákup úr Dímun, bóndi í Stóru Dímun, sigur, at hann skal stoypa fundamentið, sum nýggi vitin verður settur á. Tilfarið til nýggja fundamentið varð flogið við tyrluni úr Sandvík hósdagin. Nýggi vitin fer at standa á sama stað, sum tann gamli stendur.

Nýggi vitin verður heldur størri enn tann gamli, sigur Óla Jákup úr Dímun. Hann verður rundur og víðari ummáls, eins og hann verður hægri, enn tann gamli var. Tí skal fundamentið eisini gerast eitt sindur størri. Og tað er hetta arbeiðið, dímunarbóndin skal gera. Sjálvur vitin verður so flogin út við tyrlu og festur á boltarnar. Síðan kemur fólk at montera og binda leiðingar í.

Sólorka hevur verið roynd í samband við vitarnar í Føroyum í nøkur ár, og hevur virkað væl.

Annars sigur Óla Jákup úr Dímun, bóndi í Stóru Dímun, at samskiftið í oynna í aðrar mátar er ikki nóg gott.

Fyri einum ári síðan hevði Sosialurin samrøðu við dímunarbóndan, har hann lat at, at internetsambandið í oynna var ógvuliga svikaligt.

Síðan hevur hann skift útgerðina út fyri at vita, um tað kundi vera orsøkin. Men skilið er tað sama, hóast hann hevur fingið nýggja teldu og tað, sum til hoyrir.

Óla Jákup úr Dímun sigur, at hann fær samband og kann byrja at arbeiða við onkrum, men so slóknar aftur. Tað ber stutt sagt ikki til at líta á internetsambandið í Dímun.

Tá hugsað verður um umstøðurnar annars, átti júst internetið at verið tann leiðin, har dímunarfólk fingu samband við umheimin.

Um fuglin sigur Óla Jákup úr Dímun, at tað hevur verið heldur minni av lunda at sæð í bakkanum, enn tað var hesa tíðina í fjør. Men nú skuldi hann helst komið, tí verpingartíðin er við at vera komin.

Um lomvigan sigur hann, at har hevur hann ikki rættiliga kannað eftir, hvussu støðan er. Men hann metir tó, at tað man vera á leið tað, sum hevur verið seinnu árini.



*Tyrlan flutti hósdagin tilfar til fundamentið undir nýggja vitan úr Sandvík til Dímunar ( Mynd: Áki Bertholdsen)*



*Skotska havrannsóknarskipið Scotia fór av aftur Havnini fríggjamorgunin*
**Mynd: Álvur Haraldsen**

# Skotar kanna havið

*Hósdagin kom skotska havrannsóknarskipið Scotia á Havnia. Skipið er við í eini verkætlan, sum eisini umfatar kanningar undir Føroyum*

Skotska havrannsóknarskipið Scotia kom á Havnina hósdagin og fór avstað aftur fríggjadagin.

Skipið er við í eini verkætlan, sum EU fíggjar, og sum umfatar streym- og hitamátingar av sjónum millum Føroyar og Skotland, sigur Bogi Hansen á Fiskirannsóknarstovuni.

Scotia hevði tikið onkran streymmátara upp og kom til Havnar at skifta battarí. Hetta verður gjørt her, tí mátarin er av sama slagi, sum føroyingar brúka, og lættast var at koma hendanvegin at fáa tað gjørt, sigur Bogi Hansen.

ej






**Vælumtókta H-vindeyga í nýggjum búna**
Nýggja H-vindeyga, ið er klætt við aluminium á útsíðuni, gevur framúr viðlíkahalds fyrimunir, samstundis sum umhvørvi og trivnaður innandura verður gingin á møti við límtræði. Nú kanst tú eisini velja millum topp- ella síðusving vindeygu, ið kunnu snarast runt, so tey eru løtt at vaska.

Vindeygað verður liðugt viðgjørt - lakk-sproytað - bæði innan og uttan, síðan verður tað klætt við aluminium í tí liti, tær dámar best.

Ring á 33 21 77 og bið om brochuru og legg summarfrítíðina til rættis!

Vatnsoyra Snikkaravirki pf.
www.h-window.fo
10 ára trygd
stephanssons hús